# ítróttur

Nr. 53 • hósdagur • 17. mars 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Sundamenn taka undir við fótbóltshøll

**Á bygdarráðsfundi í Sunda kommunu mánakvøldið varð samtykt, at kommunan skal verða við í projektinum um at gera fótbóltshøll í Skálafirði**


FÓTBÓLTSHØLL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Nakað soleiðis ímynda stigtakararnir til nýggju fótbóltshøllina sær, at høllin skal síggja út.*

Ein fótbóltshøll í Skálafirði nærkast støðugt veruleikanum. Talan er um eitt uppskot, har allar kommunurnar í Eysturoynni umframt Klaksvíkar kommuna í felag taka seg saman um at byggja eina innandurða fótbóltshøll í Skálafirði.

### Binda seg ikki fíggjarliga enn

Sum skilst taka allar kommunurnar undir við projektinum. Forkanningar verða í løtuni gjørdar, og nú verður farið undir at skriva umsókn til Fótbóltssamband Føroya og Mentamálaráðið um stuðul til projektið.

FSF hevur gjørt ein faldara um fótbóltshøll, tí fótbóltssambandið metir, at tað er av alstórum týdningi, at farið verður undir at byggja eina slíka høll sum skjótast, tí at føroyskur fótbóltur hevur tørv á eini slíkari høll.

UEFA hevur sett pening av til slíka bygging, og FSF hevur ræðisrætt yvir umleið 12 milliónir krónur, ið kann latast í stuðuli til eina slíka byggiætlan.

Evstamarkið fyri at søkja um hesa stuðulsupphædd ella partar av henni er sett til 15. apríl, so stigtakararnir til projektið um fótbóltshøll í Skálafirði hava skund.

Tá ið Sunda kommuna mánakvøldið samtykti at verða við í projektinum, setti hon tó sum treyt, at allar kommunurnar, ið eru nevndar í uppritinum, verða við í ætlanini, og harafturat vildi Sunda kommuna ikki enn binda seg fyri tær umleið 1,8 milliónir, ið er teirra partur av kostnaðinum fyri projektið.

# Rógvi og Per føroyameistarar

**Teir báðir Rógvi Mohr og Per Holm Anderson vunnu týskvøldið føroyameistaraheitið í bogaskjóting í ávíkavist recurve og compound**


TÍÐINDASKRIV




*Tað er einki minni enn eitt bragd av Rógva Mohr, at hann týskvøldið vann føroyameistaraheitið í bogaskjóting í kappingargreinini recurve, tá ið havt verður í huga, at tað eru einans fýra mánaðir síðani, at hann breyt bæði handliðini*

*Mynd: Bjørg M. Anderssen*

Týskvøldið skipaði Bogaskjótifelagið Ørvur fyri FM-kapping á 18 metra frástøðu fryi vaksin í hølum felagsins í Runavík. Skotið var í bólkunujm recurve og compound við 60 pílum í innleiðandi umfari og eftirfylgjandi finaluumførum.

### Recurve

Í bólkinum recurve vóru 6 luttakarir har Rógvi Mohr, Ørvur, legði seg í oddin beinanvegin og helt tørn. Hann vann innleiðandi umfarið við (273+262) 535 stigum og persónligum meti. Næstu tveir skjúttarnir vóru javnir í stigum og máttu tí gerast av við, hvør hevði flestar 10-arar. Nr. 2 bleiv Annika Vang, Ørvur, við (261+245) 506 stigum og 15 10-arum, nr. 3 bleiv Kristian Niclasen við (255+251) 506 stigum og 12 10-arum.

– finalurnar: Rógvi og Annika sótu yvir fyrsta dyst, ímeðan ein dystur var millum Kristian Niclasen-Tórhallur Simonsen, Vágaskot, og endaði 93-75. Hin dysturin var millum tvier vágamenn Øssur Hansen og Tórfinn Hansen og skutu teir 97-97. Tí var neyðugt við umskjóting har hvør teirra skuldi skjóta ein píl. Tórfinn vann umskjótingan og dystin við at skjóta 8 ímóti 4 hjá Øssi.

– finalurnar: Rógvi-Tórfinn 109-81 og Annika-Kristian 100-96.

Dysturin um bronsuna var millum Kristian og Tórfinn og endaði 85-89.

Dysturin um at gerast føroyameistari var millum Rógva og Anniku, sum vann kappingina í fjør. Dysturin endaði 108-103 og nýggjur føroyameistari í recurve bleiv Rógvi Mohr úr Ørvi. Hetta má metast sum eitt sera flott avrik av Rógva, sum í vetur var so mikið óheppin, at hann breyt bæði handliðini í sambandi við arbeiði hjá sær.

Av hesi orsøk hevur Rógvi einans vant í umleið tríggjar vikur, áðrenn kappast var um føroyameistaraheitið.

### Compound

Í bólkinum compound vóru 7 luttakarir. Innleiðandi kappingin var sera jøvn og skiltu bert 4 stig skjúttarnar frá nr. 1-5. Nr. 1 bleiv Jóannes Poulsen, Ørvur, við (287+276) 563 stigum, nr. 2 Jógvan Niclasen, Tambar, við (285+276) 561 stigum og nr. 3 Albert Dam, Ørvur, við (279+280) 560 stigum. Per Holm Andernsen og Schandorff Vang høvdu báðir 559 stig.

– finalurnar: Jóannes sat yvir fyrsta dyst, hinir dystirnir endaðu soleiðis: Jógvan Niclasen-Kaj Johannesen, Ørvur, 111-104, Albert Dam-Kristoffer Andreasen, Ørvur, 114-105 og Per H. Andersen, Ørvur,-Schandorff Vang, Ørvur, 109-101.

– finalurnar: Í báðum dystunum gekk sera javnt á og var neyðugt við umskjóting í einum teirra. Jógvan-Albert 112-112, umdystin vann Jógvan við 10-9. Per-Jóannes 110-108.

Dysturin um bronsuna var millum Albert og Jóannes og endaði. 109-106.

Dysturin um at gerast føroyameistari var millum Per og Jógvan og var bæði spennandi og javnur. Dysturin endaði 113-112 og nýggjur føroyameistari í compound bleiv Per Holm Andersen úr Ørvi.

Statoilstøðin í Saltangará lat heiðursmerkir til kappingarnar.

## Úttøkuvenjing til U17-landsliðið

Venjarin hjá føroyska U17-landsliðnum, Pætur Clementsen, hevur tikið út 26 spælarar, ið skulu taka lut í úttøkuvenjingum, sum verða á Svangaskarði sunnudagin.

Teir 26 leikararnir eru hesir: Heðin Stenberg, Rógvi Poulsen, Fríði Jensen AB, Sjúrður Thomassen, Johan Ellingsgaard, Jóan P. Jakobsen B36, Robin Jønsson, Niklas Poulsen, André Olsen B68, Klæmint Olsen Jann M. Mortensen, Filip Jacobsen, Øssur Dalbú, Petur á Roykheyggi NSÍ, Erling Jacobsen, Benjamin Hansen GÍ, Dann Johansen MB, Torkil Kollsker HB, Ari Samson, Eli Simonsen, Álvur F. Christiansen KÍ, Heri H. Nesá ÍF, Henning Joensen, Martin Tausen VB, Atli Christiansen SKÁ, Jón Eliasen LÍF.

**tn**